# ra eftirspurningin eftir olju



*Stórur áhugi var fyri seminarinum, sum Farec skipaði fyri í útvarpshøllini*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

sum leverar umleið helmingin av oljuni hjá Saudi Arabiu.

- Í Ghwar-feltinum hava teir stórar trupulleikar við at pumpa vatn fyri at halda trýstinum, so oljan fæst upp, men í Saudi Arabiu siga tey, at tað gongur fínt!

### Búskaparvøkstur

Saman við spekulatiónini er tað vøksturin í búskapinum, sum drívur eftirspurningin eftir olju.

Teitur vísti á, at Norðuramerika og Evropa eru tey mest dominerandi, tá ið ræður um orkunýtslu og búskaparvøkstur, men ikki minst búskaparliga framgongdin í Asiu og Indiu ger, at eftirspurningurin eftir orku fer at veksa.

- Framrokningar siga nevniliga, at longur frammi í tíðini verður fólkatalið í Indiu líka stórt sum í Kina, sum hevur ein stóran BTÚ-vøkstur.

Haraftrat kemur, segði Teitur, at búskaparvøksturin í Asiu og Indiu, er nærri tengdur at orkuni enn í Ameriku og Evropu.

Búskaparfrøðingurin tók saman um og vísti á framrokningar, sum siga, at samlaði eftirspurningurin eftir orku í heiminum fer at økjast við meira enn 50% fram til 2030, um gongdin framhaldandi verður sum í dag.

- Asia fer at eftirspyrja meira orku í 2030 enn USA, segði Teitur, sum í hesum sambandi vísti á, at 6 bilar eru fyri hvørji 1000 fólk í Kina, samstundis sum fleiri hundrað eru fyri hvørji 1000 fólk í USA - og í Kina vilja fólk hava nógv fleiri bilar, enn tey hava í dag, legði hann aftrat.

### USA og Evropa

Teitur Poulsen legði tó aftrat, at verður gongdin ein onnur - og um Asia og India ikki veksa so nógv, sum útlit eru til í løtuni, kann alt broytast.

- Í øllum førum verða tað USA og Evropa, sum brúka mestu orkuna tey næstu árini.

Hann segði eisini, at stórur vøkstur er innan vind-og sólorku kring um í heiminum.

- Men hendan gongdin byrjar úr so lítlum, og tí verður hesin parturin av orkuni lutfalsliga lítil í nógv ár aftrat, segði búskaparfrøðingurin.

# Nýggjur íslendskur sleipibátur á Havnini




**Týsdagin kom íslendskur sleipibátur, sum íslendingar hava latið byggja í Póllandi, á Havnina - á veg til Íslands**

SLEIPIBÁTUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ísafjørður í Íslandi fær nýggjan sleipi- og loðsbát, sum teir hava latið byggja í Póllandi.

Báturin kom á Havnina úr Póllandi á veg til Íslands týsdagin, og nú bíða teir báðir, sum við eru, eftir betri veðurlíkindum.

Við bátinum eru havnameistarin á Ísafirði og ein maður, sum hann hevur við sær á longu ferðini.

Á veg heim úr Póllandi hevur báturin steðgað ymsastaðni, og nú loyst verður aftur í Føroyum, er seinasti teinurin upp til Íslands eftir.

Íslendski sleipibáturin kostar beint undir 5 milliónir krónur og tey, sum kenna til bygging av slíkum bátum, siga, at hetta er ein góður handil fyri íslendingar.

Sleipibáturin er slakar 15 metrar langur, og hann hevur eina 1000 hk. maskinu, sum gevur eina tógmesi upp á 14,5 tons.

VINNU SÍÐURNAR
VINNA HANDVERK HANDIL

**Hvønn dag í Sosialinum, men serstakliga mikudagar**

Tað er umráðandi og avgerandi at tit lesarar og viðskiftafólk okkara eru partur av vinnusíðunum og senda okkum tilfar og tips til søgur, sum náttúrliga hoyra heima her. Sum snúgva seg um menniskju og um virksemi og arbeiði, um nútíð og framtíð. Ein annar partur av hesum tiltaki er at vinnuvirki og handilsfyritøkur taka av tilboðnum at lýsa við sínum vørum og tænastum.

Endamálið við VINNUSÍÐUNUM er at skapa áhuga fyri og menna vinnu, handverk og handil her heima og at vera við til at byggja brýr millum Føroyar og umheimin.

Her fara eisini vælskrivandi fólk innan vinnulívið, útbúgvingarverkið, granskingarumhvørvið og tað almenna og privata annars at bera fram hugsanir og sjónarmið, sum kunnu byggja upp undir eitt sunt og lívligt orðaskifti.

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.

Navn: ____________

Bústaður: ____________

Postnr.: ____________

Bygd/býur: ____________

Telefon nr.: ____________

Undirskrift: ____________

**Ókeypis**
Verður sent ópostað
Sosialurin rindar postgjaldið
**64**

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn